Nú angar aftur væl í býnum

HANDIL
Ingrid Bjarnastein

Síðani á ólavsøku hevur einasta parfumaríið í býnum verið stongt vegna flyting. Men í gjár klokkan 10.00 kundu starvsfólkini í Parfumarí Drós stolt lata dyrnar til nýggja handilin upp, hesuferð í Dr. Jacobsensgøtu beint yvirav Keypssamtøkuni.

Parfumarí Drós hevur í hesum sambandi fingið danskan fríðkanarserfrøðing á vitjan. Vicky Fong starvast dagliga hjá Estée Lauder í Danmark, og er hon komin til Føroya at geva føroyingum ráðgeving innan húðrøkt og make-up.

– Vit hava fingið ógvuliga positivar viðmerkingar frá fólki meðan vit hava havt stongt, sigur Fía Norðberg, sum eigur og rekur Parfumarí Drós.

– Nógv hava tosað við okkum og spurt nær vit fóru at lata uppaftur, tí tey saknaðu handilin, og hevur hetta verið ógvuliga vermandi at vita, og tílíkt gevur okkum eisini mót.

Leingi er tað, ið væl skal vera verður sagt, og endiliga er latið uppaftur í nýggjum hølum.

– Vit eru ógvuliga glað fyri nýggju hølini, og handlarnir rundan um hava tikið ógvuliga væl ímóti okkum.

Parfumarí Drós hevur nú aftur opið vanligar tíðir, og nú og til og við hósdagin ber til at støkka inn á gólvið og fáa ráðgeving frá Vicky Fong innan húðrøkt og make-up. Eisini ber til at ringja á telefon 314811 og bíleggja tíð, so leggur Vicky make-up á og gevur ráð til júst tín.

Fram til hósdagin ber til at fáa ráðgeving innan húðrøkt og make-up frá danska fríðkanarserfrøðinginum Vicky Fong
Mynd: Jens Kr. Vang

Frá vinstru: Vicky Fong, fríðkanarserfrøðingur, Fía Norðberg, eigari og Katrin Dahl, lærlingur í nýggju, snotuligu hølunum hjá Parfumarí Drós
Mynd: Jens Kr. Vang

VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men seinnapartin regn ella vátakavi. Um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind. Hitin millum frostmarkið og 3 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind av suðri. Hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men okkurt kavaælið. Hitin um frostmarkið. Sunnudagin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi, regn og eitt sindur lýggjari.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷12
Nuuk	÷8
Qaqortoq	÷9
Ammassalik	÷12
Saint John's	7
Halifax	8
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	5
Lerwick	3
Aberdeen	6
London	7
Tromsø	5
Bergen	2
Oslo	–
Stokkhólm	2
Keypmannah.	4
Helsinki	1
Moskva	0
Berlin	2
Warzawa	0
Kiev	0
Bukarest	3
Paris	7
Madrid	6
Róm	14
Malorca	17
Athen	14
Malta	16
Tunis	15
Beijing	5
New Dehli	23
Bangkok	29
Jakarta	–
Sydney	–
New York	16
Miami	25
Los Angeles	13
Meksikobýur	17
Panama	–
La Paz	18
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt djúpt lágtrýst, 958 hPa. við Ísland fer í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 999 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing eystan.

Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum seinnapartin mikudag.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/11 kl. 06⁰⁰– 27/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 12,0 mm – mált frá 26/11 kl. 06⁰⁰– 27/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 144,0 mm



VESTFALLSKYRRINDI

22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2001.

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
28. nov	04.24	16.44	03.24	15.44	03.39	15.59	06.24	18.44	07.24	19.44	02.39	14.59	01.39	13.59	04.39	16.59	05.39	17.59	04.09	16.29	05.24	17.44
29. nov	05.04	17.26	04.04	16.26	04.19	16.41	07.04	19.26	08.04	20.26	03.19	15.41	02.19	14.41	05.19	17.41	06.19	18.41	04.49	17.11	06.04	18.26
30. nov	05.48	18.09	04.48	17.09	05.03	17.24	07.48	20.09	08.48	21.09	04.03	16.24	03.03	15.24	06.03	18.24	07.03	19.24	05.33	17.54	06.48	19.09
1. des	06.30	18.55	05.30	17.55	05.45	18.10	08.30	20.55	09.30	21.55	04.45	17.10	03.45	16.10	06.45	19.10	07.45	20.10	06.15	18.40	07.30	19.55

5 707265 100036 >